

*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, skrivaðu mánadagin undir eina yvirlýsing um at leggja ein yvirtøkulóg fyri fólkatingið og løgtingið*
*Myndir: Símun J. Hansen*

# Yvirtaka avgerðina um at yvirtaka

**– Hetta er tað størsta stigið, føroyingar hava tikið at fremja størri sjálvbjargni síðani 1948, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum mánadagin var í Keypmannahavn og skrivaði undir ein yvirlýsing um seta eina yvirtøkulóg í gildi**

YVIRTØKA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tíðliga mánamorgunin setti Jóannes Eidesgaard, løgmaður, seg í eitt av flogførunum hjá Atlantsflogi við kós ímóti Keypmannahavn.



*– Yvirtøkulógin verður tað nýggja amboðið í sambandi við allar yvirtøkur hereftir. Vit hava upplivað nøkur málsøki, sum tað næstan hevur verið ógjørligt at yvirtaka, men tann nýggja lógin fer at geva okkum heilt nýggjar møguleikar at yvirtaka, sigur løgmaður*

Nakrar tímar seinni hevði hann skrivað undir eina yvirlýsing, sum hann kallar størsta frambrotið fyri føroyskum sjálvbjargni síðani 1948.

– Tann nýggja yvirtøkulógin ger, at føroyingar sjálvir – og einsamallir – gera av, um vit vilja yvirtaka málsøki frá dønum. Í nøkrum førum skulu samráðingar um treytirnar til, men eingin ósemja kann longur steðga einari yvirtøku, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður og Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, skrivaðu mánadagin undir yvirlýsingina um at leggja uppskot fyri løgtingið og fólkatingið at seta yvirtøkulóg í gildi.

– Hetta er tað størsta stigið, føroyingar hava tikið at fremja størri sjálvbjargni síðani 1948, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

### Lættari yvirtøkur

Tann nýggja yvirtøkulógin skal víðka munandi um heimildirnar at yvirtaka málsøki, samstundis við at tilgongdin verður munandi lættari. Við yvirtøkulógini kunnu føroyingar taka yvir mál og málsøki, tá ið - og um - føroyingar ynskja tað.

Týdningamiklasta broytingin við yvirtøkulógini er, at føroyingar nú einans skulu samráðast við danir um ávís málsøki, men tað verður ikki neyðugt longur at bíða eftir semju. Tað merkir, at føroyingar kunnu velja at yvirtaka, sjálvt um tað hendir, at partarnir ikki eru samdir.

– Vit kenna til nógvar truplar yvirtøkur. Tað tók 17 ár at yvirtaka undirgrundina, tí partarnir kundu ikki semjast. Nú kunnu vit yvirtaka tey flestu málsøkini við bara at boða frá tí, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Alt uttan fullveldi

Dómsvald, revsirættur, persóns-, familju- og arvarættur, fíggjarrættur og útlendingamál eru dømi um stór og týdningamikil mál, ið ikki eru nevnd í heimastýrislógini, men sum føroyingar eftir nýggju lógini kunnu velja at gera til føroysk málsøki.

Øll mál kunnu sostatt yvirtakast, uttan tey, ið beinleiðis eru tengd at ríkisfelagsskapinum – eitt nú Hægstirættur, ríkisborgaraskapur og uttanríkispolitikkur.

– Yvirtøkulógin verður tað nýggja amboðið í sambandi við allar yvirtøkur hereftir. Vit hava upplivað nøkur málsøki, sum tað næstan hevur verið ógjørligt at yvirtaka, men tann nýggja lógin fer at geva okkum heilt nýggjar møguleikar at yvirtaka, sigur løgmaður.

## Høgni Hoydal er spentur

**– Nýggja avtalan við danir kann gerast ótrúliga áhugaverd fyri føroyingar, heldur Høgni Hoydal, sum á middegi mánadagin ikki kendist smálutirnar í avtaluni, men bíðaði spentur eftir at frætta meira**

YVIRTØKA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Um prinsippið verður tað, at vit kunnu yvirtaka stór málsøki uttan at binda okkum føst í danska ríkið, so kann tann nýggja avtalan við dansir gerast ótrúliga áhugaverd fyri føroyingar.

Tað sigur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, eftir at tað kom fram, at løgmaður og danski forsætisráðharrin mánadagin skrivaðu undir eina yvirlýsing um at leggja ein yvirtøkulóg fyri fólkatingið og løgtingið.

– Fyri okkum er tað avgerandi, um hendan lógin peikar frameftir og gevur føroyingum rættin til sjálvir at taka frælsi í hesum landinum, sigur Høgni Hoydal.

### Tað vóru forðingar

Tann nýggja yvirtøkulógin skal víðka munandi um heimildirnar at yvirtaka málsøki, samstundis við at tilgongdin verður munandi lættari. Við yvirtøkulógini kunnu føroyingar taka yvir mál og málsøki, tá ið - og um - føroyingar ynskja tað.

– Vit settu gongd í hetta arbeiðið, tá ið vit sótu í landsstýrinum, men tá vóru forðingar fyri, at ein yvirtøkulóg kundi gerast. Um hesar forðingar eru ruddaðar á vegnum, so er hetta ein góð avtala, heldur Høgni Hoydal.

Hann vísir eisini á, at um danir við avtaluni góðkenna føroyingar sum eitt fólk við sjálvsavgerðarrætti, so er tað eisini ein stórur sigur fyri føroyingar.

– Hetta er nakað, sum vit hava stríðst fyri í langa tíð, og eg havi eisini júst sett ein fyrispurning á fólkatingi um hetta. Um so er, at nýggja avtalan góðkennir føroyingar sum eitt fólk við sjálvsavgerðarrætti, so er tað gleðiligt, sigur Høgni Hoydal.

# Flogvøllurin á føroyskar hendur

**Ein serfrøðinganevnd við føroyskum og donskum limum skal fyrireika eina dagføring av flogvøllinum í Vágum. Pengarnir til útbyggingina skulu koma úr tí danska Íleggingargrunninum**

YVIRTØKA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nú skal flogvøllurin á Vágum á føroyskar hendur.

Tað eru løgmaður og danski forsætisráðharrin blivnir samdir um.

Samstundis verður ein serfrøðinganevnd sett, sum skal fyrireika eina dagføring av flogvøllinum í Vágum.

– Vit eru blivnir samdir um, at føroyingar yvirtaka tær donsku ognirnar á flogvøllinum, og samstundis tryggja vit okkum, at flogvøllurin verður dagførdur, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

– Eitt kritikkpunkt hjá okkum hevur verið, at flogvøllurin í Vágum hevur ikki fylgt við tíðini, men nú verður ein serlig nevnd sett at fyrireika eina útbygging, og fíggingin til arbeiðið skal finnast í tí danska Íleggingargrunninum. Harvið skulu vit ikki finna upphæddina til útbyggingina á føroysku fíggjarlógini, sigur løgmaður.